# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Kristianna Hammer, Fåborg:

## Fyrsti Ph.D. lesandi í sjúkrarøkt í Odense



Tá Føroya Felag móti krabbameini herfyri fylti 25 ár, var Kristianna Hammer, sjúkrarøktarfrøðingur, boðin at halda ein fyrilestur í Norðurlandahúsinum um vón og vónloysi hjá krabbameinssjúklingum

Kristianna er føroysk, hon er fødd og uppvaksin í Havn, og búi í her til 1981, tá hon saman við familjuni flutti til Danmarkar og búsettust í Odense. Sama ár sum hon varð útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingur á Føroya Sjúkrasystraskúla, sum skúlin æt tá.

Hon hevur í mong ár arbeitt á Odense Universitets Hospital, serliga innan stráluviðgerð av krabbameinssjúklingum.

Í 2000 fekk Kristianna Diplom-útbúgving innan sjúkrarøkt, og í 2003 bleiv hon cand. cur. í sjúkrarøktarfrøði.

Í løtuni tekur hon, sum tann fyrsti í Odense, Ph.D. útbúgving innan sjúkrarøkt við Odense Universitets Hospital, har hon granskar í vónini og vónloysinum hjá krabbameinssjúklingum.

Kristianna er gift við Eilif Hammer, sonur Alfridu og Andreas Hammer í Runavík, ið herfyri kundu halda jarnbrúdleyp, tá tey høvdu verið gift í 70 ár.

Kristianna og Eilif eiga trý børn: Rúni, ið 29 ára gamal, giftur, og lesur teologi í Århus, Fróði er 24 ára gamal og lesur til sivilverkfrøðing, og Turið, sum er 22 ára gomul og býr í Havn, hon flutti til Føroyar at búgva eina tíð, áðrenn hon sum ætlað søkir inn at lesa medicin í vár.

Eilif arbeiðir sum systemprogrammør hjá KMD í Odense.

Fyri trimum árum síðan flutti familjan til Fåborg at búgva.

Foreldrini hjá Kristiannu, Margit, f. Christiansen, og Erling Poulsen, áttu og róku bakaríið Acta í Torfinsgøtu í mong ár. Tey seldu bakaríið og fluttu til Danmarkar í 1981.

Mamman, Margit doyði í 1987, 57 ára gomul. Hon var dóttir Kristinu, vanliga nevnd Tina, ættað úr Froðba, og Sverra Christiansen, vanliga nevndur Sverri í Mattalág, skipsbyggjara í Havn.

Pápin, Erling, er sonur Annu, f. Simonsen, ættað av Velbastað, og Palla Poulsen, úr Gøtu, vanliga nevndur Palle Bager. Tey høvdu bakarí í J.C. Svabosgøtu, sum Conrad Skaale seinni keypti og rak í mong ár.

Erling er í dag 76 ára gamal og býr í Odense.

Umframt at granska og skriva verður Kristianna javnan boðin at halda fyrilestrar um vón og vónloysi hjá krabbameinssjúklingum og um virðingina fyri menniskjanum innan lækna- og sjúkrarøktarútbúgvingarnar.

## Góði Kalle



Nú ert tú farin heim, heim til guð okkkara, hann sum tú og eg, altíð hava litið á. Orð míni er ikki mong, men eg og tú litu á Jesus, hann var og er álit okkara. Hvíl í friði.

Tín persóniligi vinur,

**Knút Petur í Gong**

### Prógv

Brynhild Kalsø Hansen fra Sakskøbing er vorðin cand. mag. í Moderne Kultur og Kulturformidling frá Københavns Universitet tann 12. november.

†

Kunngjørt verður at kæri bróður mín

**Herman Joensen**
**Hósvík**

andaðist á Lágargarði, leygardagin 27. november
81 ára gamal.
Farið verður av Lágargarði týsdagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju
mikudagin kl. 13.00.

**Bergitta**

## Ásmundur á Geilatrøð í Norðragøtu deyður

Gamla verðin hevur mist son, Ásmund Thomsen, 85 ár.

Rigmor, sum kom úr Ringsted aftaná kríggið, hevur mist sín Ásmund, mannin.

Lívið slóknað, men minnini so klár um hetta parið, sum eingi børn áttu, men sum var so nógv fyri onnur, børn sum vaksin.
Lærdóm høvdu bæði, men mest taldi umsorgan.

Takk fyri árini við gestablídni í Danmark.

**Sjúrður Hansen, Gøtu.**


# Jóa Ziska
# 50 ára starvsdagur

1. desember 2004 hevur Jóannes L. Ziska (Jóa) arbeitt hjá Føroya Tele í 50 ár.

Í hesum sambandi ynskja vit at bjóða teimum, ið ynskja at heilsa uppá Jóa á hesum stóra degi, til móttøku í nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Klingruni 1. desember kl. 14.00.



FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum


### Dagurin

**30. november. Andrasarmessa**. Um lærusveinin Andrias sigur apokrýfisk søgn, at hann, tá ið ápostlarnir skiltust, fór sum trúboðari til Grikkalands og um svartahavsleiðirnar. Hann noktaði fyri at tæna skurðgudunum og varð krossfestur. Krossurin hann var hongdur á, var settur saman á skák, og ein tílíkur krossur hevur síðani verið róptur andrasarkrossur.

Á kirkjubøstólunum við træskurðinum av Andrasi er hann avmyndaður við hesum krossi. Andras hevur verið høgt mettur sum halgimenni t.d. í Russlandi og Skotlandi, og vit vita, at minningardagur hansara, 30. november, eisini hevur verið hildin í Føroyum.

Navnið er grikst og merkir *maður*.